## Ultraljóðskanning av hjartanum gjøgnum vælindið

### Transøsfageal ekkokardiografi

Tygum eru biðin um at koma til ultraljóðskanning av hjartanum.
Hendan kanningin verður framd gjøgnum vælindið.
Við at kanna hjartað ígjøgnum vælindið, fáast sera góðar og neyvar myndir av hjartanum.

### Kanningardagin:

Viðtalan er sett til uml. 45 min., men sjálv kanningin tekur uml. 10 min.
Tygum skulu vera fastandi til kanningina t.v.s. ikki hava etið í 4 tímar áðrenn.
Loyvt er at busta tenn og taka morgummedisin, men svølg lítið av vatni afturvið.

### Kanningin

Lækni og sjúkrarøktarfrøðingur eru við til kanningina.
Lagt verður venflon (eitt lítið plastikkrør í eina venu á handbakinum).

Landssjúkrahúsið
tel 304500, www.ls.fo

Givið verður stillandi heilivágur, harnæst verður doyving gjørd í svølginum við at nýta pístr (spray).
Um tygum hava tannprotesu, verður hon tikin burtur beint áðrenn kanningina.
Undir kanningini skulu tygum liggja á vinstru lið, nakað framyvir við høkuni móti bringuni.
Sjálv kanningin fer fram á tann hátt, at ein slanga verður førd niður ígjøgnum vælindið.

Beint eftir kanningina fáa tygum úrslitið at vita, sum eisini verður sent til tygara egna lækna.

Orsakað av doyvingini, kunnu tygum ikki eta ella drekka í ein tíma eftir kanningina, tí tað kann fara rangt.

**Møgulig hjáárin**

Ein kann vera eitt sindur eymur í hálsinum nakrar fáaar dagar eftir kanningina.
Sjúklingar, sum hava trupulleikar í vælindinum, kunnu fáa "útposing" ella treinging, men sum heild er kanningin uttan hjáárin.

Vinarliga starvsfólkið á G3?

Landssjúkrahúsið
tel 304500, www.ls.fo